## Høgni vísir Amager aftur

Høgni Midjord úr B71 var fyri vikum síðani til royndarvenjing hjá Toda Jónssyni og FC Amager. Føroyski framherjin stóð seg eftir øllum at døma væl, tí felagið var sinnað at bjóða honum sáttmála. Men tað er Høgni Midjord ikki áhugaður í. – Eg eri ikki til reiðar at sleppa øllum, sum eg havi í Føroyum. Eg vil heldur halda fram og menna meg her eina tíð aftrat, áðrenn eg fari at royna meg. Sum eg skilji, so eri eg vælkomin seinni eisini, sigur Høgni Midjord. Spurdur, um hann ikki hevði ment seg meira á Amager, svarar hann. – Jú, allarhelst, men eg veit ikki. Hugurin er ikki til tað júst nú, staðfestir Høgni Midjord.

## Clapson er toppskjútti

Fyrrverandi KÍ-framherjin, Paul Clapson, stríðist í hesum døgum við at skjóta Afturelding í næstbestu íslendsku deildina. Higartil hevur gingið sum eftir ánni hjá honum persónliga, og hann er toppskjútti í deildina. Um vikuskiftið var hann aftur á blettinum, tá Afturelding á heimavølli spældi javnt 2-2 móti Volsungur. Onglendingurin skoraði til 1-0. Felagið hjá Clapson er í løtuni á øðrum plássi, 11 stig frá fyrsta plássinum.

Víkingur – B71 2-2 (1-1):

# Símin Hansen gjørdist dýrur

*Víkingur*

*B71*

**Fyrst gjørdi hann sjálvmál, og síðan sá hann reytt. Símin Hansen gjørdist sandoyingum dýrur, tá B71 vitjaði í Gøtu í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað er ikki altíð stuttligt at vera fótbóltsleikari. Tað eigur skopuningurin Símin Hansen í øllum førum at sanna. Hann átti ein sera óhepnan leiklut, tá B71 vitjaði í Gøtu við vón um kærkomin stig. Útlini fyri einum óvæntaðum sigri vóru góð miðskeiðis í seinna hálvleiki. Mikkjal Hentze hevði lagt gestirnar á odda, tá bólturin tók í verjuspælara og fór í bleytum boga upp um Geza Turi. Men við eitt broytist alt. Símin Hansen er óheppin og fær ikki gjørt nógv annað, tá hann sendir bóltin í egi net. Fríspark kom úr høgru, tá Hjartvard Hansen skallaði í skinnabeini á verjuleikanum, áðrenn bólturin fór um málstrikuna. 2-2, sum eisini varð endiliga úrslitið. Løtu seinni var hann útvístur, tá hann – eftir hvat skilst – hevði klípt framherjan hjá Víkingi, Zoltan Bukszegi. Símin Hansen var full greiður yvir, at nú var galið, og hann slapp sær alt fyri eitt av vøllinum, uttan so frægt at mótmæla.

- Eg havi onga viðmerking til hendingina, slær hann fast.



*Myndatekstur: Símin Hansen gjørdi bæði sjálvmál og fekk reytt kort, tá B71 vitjaði hjá Víkingi í gjár*
*Savnsmynd*

### Heimaliðið omaná

Anton Skoradal mátti vera fleiri av sínum stuðulsleikarum fyri uttan í gjár. Hans Jørgen Djurhuus, Andreas Lava Olsen, Niclas Niclasen og Atli Gregersen vóru leikbannaðir, meðan Magnus Skoralíð er burturstaddur. Og tað eigur at merkjast. Í sær sjálvum er tað ikki nøktandi at fáa tvey mál ímóti sær á heimavølli, men í gjár bóru áskoðararnir yvir heimaliðnum.

Tað byrjaði nú rættiliga væl. Víkingur var leikliga omaná, og í løtum trýstu teir gestirnar. Hjartvard Hansen, sum røkti uppgávuna sum vongverji í høgru, var fullkomiliga óansaður, tá hann stýrdi bóltinum upp um málið eftir fáum minuttum. Løtu seinni skuldi Zoltán Bukszegi lagt heimaliðið á odda, men av fimmmetra markinum sendi hann beint á Símun Rógva Hansen í málinum. Fyrsta málið kom, tá dysturin var 25 minuttir gamalur. Áslakkur Petersen sendi fríspark inn úr høgru, og hægstur var leigusveinurin úr FC Amager, Erling Jacobsen, sum stýrdi bóltinum í netið.

Men sekundvísarin var ikki komin meira enn tvær ferðir runt, tá bólturin var í hinum málinum. Nigerianin Patrick Sunday skjeyt sítt fyrsta mál fyri B71, tá hann sendi framvið Geza Turi.

### Høvdu onga ætlan

Víkingur stríðist í løtuni við at verða føroysk umboðan í altjóða fótbólti í komandi kappingarári. Tað burdi tí verið krav at fáa fult í Sarpugerði móti B71. Men veruleikin er, at heimaliðið ongantíð setti sandoyingar undir trýst eftir hvíldina. Framrættaða spælið var lítið skipað, og tóktist tað sum, at Víkingur dúvaði upp á at fáa mál eftir onkra tilvildarliga støðu. Teir høvdu onga ætlan í framrættaða spælinum. Heimaliðið var, sum vanligt, sera vandamikið eftir deyðbóltstøður, og tað var eftir hesar, at bæði málini komu.

Sam Jacobsen, sum var liðformaður hjá Víkingi í gjár, var um reppið at skjóta sigursmálið í seinasta minuttinum, men við rygginum móti málinum sendi hann í stólpan.

Eyðkenni fyri bæði Víking og B71 er fyrimyndarligi stríðsviljin. Hóast leikararnir góvu seg fult út í gjár, so sóust ongar vandamiklar, glíðandi takklingar, sum vit ikki ynskja í fótbólti.

B71 hevði fleiri frálík uppspøl – millum annað tá Wellington rakti í stongina. Sandoyingar dugdi betri at undirhalda, men tað sigur seg sjálvt, at tað fekk stóra ávirkan, tá Símin Hansen var útvístur. Tá hugsaðu teir meira um verjupartin.

### Rós til Páll

Páll Augustinusen dømdi dystin í Sarpugerði í gjár. Tað er ikki altíð léttasta uppgávan at vera dómari í hesum døgum, men hann skal eiga rós fyri sítt avrik her frá. Tað slepst ikki undan, at tað í hvørjum dysti eru ivasamar støður, men sum heild leiddi Páll Augustinusen sera væl.

- Dómarar hava sanniliga eisini uppiborið herðaklapp. Páll Augustinusen dømdi sera væl í gjár, eg kann ikki seta fingurin á nakra avgerð. Suverent, sigur Anton Skoradal, venjari hjá Víkingi.

### Ikki nøgdur

Eli Henzte var, hóast javnleik á útivølli móti Víkingi, ikki nøgdur við úrslitið.

- Nei, tað eri eg ikki. Vit høvdu tamarhald á støðuni í seinna hálvleiki. Vit kunnu bara iðra okkum um, at vit ikki spælu sigurin í hús, sum vit áttu. Vit fóru eftir øllum stigunum, men hinvegin, so kundu vit eisini mist alt. Teir hava jú millum annað bóltin á stongina í seinasta minuttinum, sigur Eli Hentze.

Tað slepst ikki uttan um at spyrja um reyða kortið hjá Símin Hansen.

- Tað havi eg onga viðmerking til, staðfestir B71-venjarin, sum, hóast hann bara fekk eitt, er nøgdur við stig.

- Øll stig eru kærkomin. Vit síggja eitt nú, at KÍ vinnur við tveimum málum í Runavík, so kappingin er ikki at rokna út. Vit skulu bara hugsa um at samla so nógv stig sum gjørligt og vóna, at tað verður nógmikið, sigur Eli Hentze, venjari hjá B71.

### Soleiðis mátti tað verða

Anton Skoradal hevði torførar arbeiðsumstøður til dystin í gjár. Hann mátti verða fimm av sínum stuðulsleikarum fyri uttan.

- Eg eri nøgdur við javnleiki. Út frá fortreytunum, so var tað fínasta slag.

*Spælið hjá tykkum er lítið skipað, serliga í seinna hálvleiki. Andreas Lava Olsen manglaði kanska?*

- Tað sigur seg sjálvt, at tá okkara einasti landsliðsleikari er burtur, so merkist tað. Vit gjøru fleiri broytingar, og evnaríki Sam Jacobsen, sum hevur verið drúgvur á miðvøllinum, noyddist millum annað aftur í verjuni. Eg eri nøgdur við allar leikararnar, men sjálvandi vilji eg havt hinar við. Men eitt er so, at vit ikki fáa mál á møguleikarnar í fyrra hálvleiki, tá vit av røttum skuldi havt avgjørt dystin, sigur Anton Skoradal, venjari hjá Víkingi.